Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eirikur í Jákupsstovu, løgtingsmaður

Svarari: Dennis Holm, landsstýrismaður í samferðslumálum

Evni: Útvarpið hjá KVF í tunlum kring landið

Spurningar:

1. Í hvørjum tunlum kring landið hoyrist útvarpið hjá Kringvarpi Føroya?
2. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at skipa fyri, at útvarpið hoyrist í fleiri tunlum?
3. Hvør er ætlanin við hesum í tunlunum, sum er ávegis, herundir í tunlunum norður um Fjall, Dalstunlinum og Famjinstunlinum?

Viðmerkingar:
Í fleiri tunlum kring landið hoyrist útvarpið hjá Kringvarpi Føroya og í summum førum eisini aðrar rásir, har til dømis Eysturoyartunnilin hevur sína egnu rás við einum verki, sum er gjørt til tunnilin.

Hetta eru tænastur, sum borgarar, ið ferðast í tunlunum kring landið annaðhvørt í sínum starvi, til og frá arbeiði ella av øðrum orsøkum eru fegin um og njóta gott av.

Tað kann eisini vera ein spurningur um trygd, har útvarpið hjá Kringvarpinum er ein partur av tilbúgvingini. Tað er helst avmarkað, hvussu ofta tað er viðkomandi í teimum tunlunum, har útvarpið ikki hoyrist í dag, men tað kann vera sera álvarsligt, um ein slík støða er. Tí er tað eisini ein spurningur um kensluna av tryggleika hjá teimum, sum brúka hesar tunlarnar.

Kringvarpsgjaldið er heldur ikki onki eftir hondini, og tað skal rindast uttan mun til, um útvarpið hoyrist ella ikki. Tað eru helst fleiri bólkar, sum av ymiskum orsøkum ikki brúka Kringvarpið, men tað er fyri summi ein keðilig kensla at rinda fyri eitt útvarp, sum mann ein part av tíðini ongan møguleika hevur at hoyra.

Sum skilst er støðan kring landið ikki eins, og tí er viðkomandi at vita, hvør tankagongd liggur aftanfyri raðfestingarnar í hesum sambandi og hvørjar framtíðarætlanir eru á økinum.

Á Løgtingi, 8. mars 2023

Eirikur í Jákupsstovu